# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Indarar keypt SsangYong




SsangYong Korando kemur á evropeiska marknaðin í 2011

Eftir at bilmerkið SsangYong mest sum hevur ligið í dvala í eina tíð, hevur indiska bilkonsernin Mahindra & Mahindra Ltd. nú yvirtikið suðurkoreansku bilverksmiðjuna.

Indarar eiga 70 prosent av partapeninginum í SsangYong, og framleiðslan heldur fram við nøkrum av teimum kendu modellunum. Ætlanin er eisini at víðka framleiðsluna til nógv ymisk nýggj modell. Tann fyrsti nýggi SsangYong verður Korando, sum er designaður í Evropa til evropeiska marknaðin. Korando, ið kemur á marknaðin í 2011, verður at fáa við í ymiskum útgávum og einum nýggjum Euro5 dieselmotori við 175 hk.




Elbilurin Nissan Leaf er kosin ársins bilur í Evropa 2011

# Elbilur ársins bilur í Evropa

Fyri fyrstu ferð nakrantíð er ein elbilur kosin ársins bilur í Evropa. Tað vóru tilsamans 57 evropeiskir motorjournalister, sum skuldu tilnevna European Car of the Year 2011. Í grundgevingunum fyri at tilnevna Nissan Leaf til ársins bil verður m.a. sagt, at bilurin er brúkaravinarligur og eitt frambrot innan elbilar.

Nissan Leaf kann koyra upp til 175 km upp á eina løðing. Sølan av bilinum byrjar nú í desember í Japan og USA, meðan sølan í Evropa byrjar í 2011.

Hósdagin 9. desember kl. 17.10

Í sendingini Vinnu- & Bilradio verður vitjað á fakmessuni hjá FTZ í Odense Congress Center, har samrøður eru við nakrar av framsýnarunum um ymiskar spennandi nýggjheitir til bilar.

Í vinnuinnslagnum er samrøða við Jens Sørensen stjóra í FTZ, sum er størsta eykalutafyritøkan í Danmark og hevur tvær deildir í Føroyum.

Eisini er samrøða við Óla Olsen, ið m.a.fortelur um tá hann koyrdi hýruvogn á bilstøðini Auto saman við Sverra Djurhuus, sum hann hevur skrivað bók um.




Vinnu- & bilradio á Rás 2